# 407'arin besti arbeiðsbilur í Danmark




Sosialurin 311820

Danska avísin Børsen hevur júst gjørt árligu royndina, "Danmarks bedste Jobbil". Hetta er fimta árið á rað, at royndin verður gjørd, og í ár stóð kappingin millum 9 dieselbilar. Bilarnir verða royndir uppá allar hugsandi mátar, í býum, landavegi og motorvegi, men eisini verður roynt at leggja trýst á bilarnir í óvanligum støðum, íméðan kannað verður, hvussu bilarnir klára hesar støðurnar. Hvør bilur fær stig fyri tíggju ymisk øki, har karakterurin er á stiganum 0-10 (10 er best). Samlaða úrslitið er miðal av tølunum hjá teimum fýra dómarunum, ið ikki kendu úrslitið hvør hjá øðrum. Endaliga úrslitið var hetta:

**Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004**

| *Nr.* | *Merki* | *Stig (max. 100)* |
|---|---|---|
| 1 | Peugeot 407 1,6 HDI | 87,5 |
| 2 | VW Passat 1,9 TDI | 85,1 |
| 3 | Skoda Octavia 1,9 TDI | 78,9 |
| 4 | Renault Laguna 1,9 cDi | 75,9 |
| 5 | Ford Mondeo 2,0 TDCi | 73,9 |
| 6 | Mazda 6 2,0 DE | 71,4 |
| 7 | Toyota Avensis 2,0 D | 69,7 |

Um vinnaran, Peugeot 407, verður millum annað sagt: "Vit máttu líka ringja til Peugeot fyri at kanna tað enn einaferð. Peugeot valdi at senda ein 407'ara við 1,6 liturs HDI motori, og hann skuldi kappast við 8 øðrum 1,9 og 2,0 liturs diesel-lokomotivum. Men Peugeot 407 1,6 HDI kom, sá og sigraði við tí minsta motorinum í bólkinum… 1,6 liturs HDI motorurin er ein lítil perla… Flott snið, lekkurt interiør og framúr koyrigleði... Trupult er at seta fingurin á nakað… Øll eru samd um at rósa undirvogninum fyri eginleikarnar, og bilurin livdi eisini upp til hetta í royndunum… 407'arin er ikki einans ein av teimum nýggjastu og mest komfortablu í hesum bólkinum, hendan útgávan er eisini ein av teimum alrabíligastu bilunum á marknaðinum…"

Samanumtikið er eingin ivi, Peugeot 407 1,6 HDI koyrir avstað við heitinum "Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004".

*Kelda: Børsen*

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00



Jákup Müller, skipari á Brimli:

# Uttan yvirlivilsisdrakt – eingin bjarging

**– Vit hoyrdu neyðarkallið hjá Emily, og eg má siga, at tað var ein ógvuliga róligur maður, sum rópti "may-day" og uppgav eina serstakliga neyva positión. Sum umstøðurnar vóru inni í briminum í myrkrinum hetta kvøldið, høvdu menninir ikki verið bjargaðir, um teir ikki vóru í yvirlivilsisdrakt, sigur skiparin á Brimli, Jákup Müller**



*Tað tók langa tíð hjá Brimli at sleipa Emily til lands, tí báturin fleyt bara á luftini undir bakkanum. – Vit tordu illa at festa í pullartin, tí vit hava ringar royndir av hesum, men at enda høvdu vit einki annað val – og tað eydnaðist at fáa bátin til lands, tí pullarturin helt, sigur Jákup Müller, skipari á Brimli*

*Mynd: Leivur Nygaard*

SKIPSBROT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta sunnukvøld var um reppið, at brøðurnir, Eirikur og Halgir Poulsen úr Porkeri, lótu lív undir Múlatanga eystantil á Suðuroynni. Teir vóru á veg úr Porkeri og norður til Hvalbiar, tá teir í myrkrinum hetta kvøldið fingu trupulleikar við brenniolju-filtrinum og endaðu inni í briminum.

– Tað breyt meira uttan fyri enn innanfyri, báturin fyltist við sjógvi og legði seg eini 90 stig, segði Eirikur, sum eigur bátin, við Sosialin morgunin eftir hendingina.

Eftir at Eirikur og Halgir sóu, hvussu vorðið var, vóru teir skjótir í yvirlivilsisdraktina. Stundum vóru teir í søkkandi bátinum, og stundum flutu teir á sjónum við bátinum siglandi í klingur rundan um seg. Uppi í bátinum hekk gummibáturin, og vandi var fyri, at teir fingu bátin á seg – ella línuna, sum var ímillum bátin og gummibátin.

Ljós vóru á yvirlivilsisdraktini, og tí sóu teir at kalla alla tíðina hvønn annan, meðan teir flutu í briminum.

Tá ið motorurin á bátinum umsíðir steðgaði, svumu teir báðir aftur til bátin og sluppu uppí hann.

Ein annar útróðrarbátur, Petur M, kom teimum tá til hjálpar. Seinni komu eisini Jónrit og Brimil.

Eirikur og Halgir vóru tó verandi umborð á Emily, til reyvin á bátinum fór undir. Tá lupu teir aftur í havið. Petur M tók Eirik upp, og gummibáturin hjá Brimli tók Halgir upp.

### Hoyrdu neyðarkallið

Skiparin á Brimli, Jákup Müller, sigur, at teir hoyrdu neyðarkallið, sum neyðstøddu menninir sendu.




– Eg má siga, at tað var ein ógvuliga róligur maður, sum rópti "may-day" og uppgav eina serstakliga neyva positión. Hann uppgav longd og breidd uppá "komma", sum Jákup tekur til.

Skiparin á Brimli sigur seg hava skilt, at høvdu Eirikur og

Halgir ikki yvirlivilsisdraktir í bátinum, hevði neyvan nøkur vón verið fyri bjarging, soleiðis sum umstøðurnar lagaðu seg inni í briminum og myrkrinum hetta kvøldið.

Eirikur hevur nevniliga greitt frá, at Halgir, sum var fyrstur í gummibátin, fekk ikki kubba línuna, og tískil varð gummibáturin hangandi uppi í Emily, sum lá við skrúvu. At enda hálaði Emily gummibátin undir, og tá endaði Halgir aftur á sjónum.

– Tá ið eg hvørki sá ella hoyrdi nakað til beiggja mín, leyp eg eisini í havið fyri at finna hann, segði Eirikur mánamorgunin.

Tá ið so motorurin á Emily umsíðir steðgaði, svumu teir báðir aftur til søkkandi bátin og sluppu sær uppí hann aftur.

Og tá var tað, at bjargingin kom…

### Torført at sleipa

Jákup Müller sigur, at tá ið Eirikur og Halgir vóru tiknir upp av sjónum, fóru teir undir at sleipa Emily, men tað var léttari sagt enn gjørt, tí báturin fleyt bert á luftini í bakkanum.

– Vit tordu í fyrstu syftu ikki at seta á pullartin á bátinum, tí vit hava ringar royndir av hesum. Ofta skrædnar úr, luftin fer undan bakkanum, og báturin fer til botns. Vit royndu tí at fáa stroppar um alt húsið og hiva bátin uppat síðuni á Brimli. Men okkurt hvast stál hevur verið um húsið, tí stropparnir vórðu skornir av. Vit royndu tí aftur við breiðari og sterkari stroppum. Tað eydnaðist enn einaferð at fáa fast um bátin, men eisini hesaferð vórðu stropparnir skornir tvørtur av.

Hann sigur, at tað vísti seg, at stál sum er um línuspælið og mastrarnar skar stropparnar tvørtur av.

– Vit hildu tí, at vit kortini skuldu royna at festa í pullartin, og tað vísti seg, at pullarturin helt.

Brimil sleipaði Emily á Tvøroyri, har báturin sakk og hekk á línuni, sum fest var um stevnið. At enda hivaðu teir bátin uppundir hekkuna á Brimli, har hann var hangandi til morgunin eftir.

– Tað tók langa tíð at sleipa, tí ferðin var bert 1,8 sjómíl um tíman, sigur Jákup Müller, skipari.

## Gekk væl at flota bátin

**Løgreglan á Tvøroyri sigur, at sjófrágreiðing verður í málinum, men enn er ikki vist, nær hetta verður og heldur ikki, um hetta verður á Tvøroyri ella í Havn**

EMILY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gekk væl at flota útróðrarbátin, Emily, aftur.

Jákup Muller, skipari á Brimli, sigur, at kavarar fóru niður við stroppum um 9-tíðina mánamorgunin og settu fast í bátin.

– Klokkan 9.54 var báturin í vatnskorpuni, og ein lítlan tíma seinni fleyt hann aftur.

Skiparin sigur, at so hvørt, sum báturin kom undan vatnskorpuni, pumpaði manningin á Brimli sjógvin upp úr honum.

– Vit byrjaðu at pumpa í maskinrúminum og síðan í lastarúminum. Síðan skiftu vit pumpurnar ímillum, til allur sjógvurin var komin upp úr bátinum

Jákup sigur, at tveir lastbilar við krana vóru við í arbeiðinum, soleiðis at til bar alla tíðina at halda bátin á rættkjøl.

– Tað vísti seg ikki, at meira sjógvur kom í bátin eftir, at hann var pumpaður tómur.

Jákup Müller sigur, at einki hol var á skrokkinum, men báturin hevði mist róðrið.

### Sjófrágreiðing

Løgreglan á Tvøroyri sigur, at sjófrágreiðing verður í málinum, men enn er ikki vist, nær hetta verður og heldur ikki, um hetta verður á Tvøroyri ella í Havn.

– Vit staðfestu, at menninir, sum komu illa fyri hetta sunnukvøldið undir Suðuroynni, ikki vóru sjónliga ávirkaðir av rúsdrekka, og tí er okkara partur í málinum liðugur. Vit tosaðu við báðar menninar og staðfestu, at har var einki at seta fingurin á, sigur løgreglan á Tvøroyri.